Fór frá eftir ferjuvanlukku

Flutningsmálaráðharrin í Senegal hevur lagt frá sær aftan á ferjuvanlukkuna í síðstu viku, sum kravdi næstan 1.000 mannalív. Bara 64 av teimum 1.034, sum vóru við ferjuni, vórðu bjargað á lívi.

Ferjan "Le Joola" var góðkend til 550 ferðafólk. Forsetin í Senegal hevur upplýst, at ferjan var ikki bygd til at sigla á víðum havi. Kortini sigldi hon millum tvær havnir við Atlantshavið, og á hesari seinastu ferðini vóru næstan tvær ferðir ov mong ferðafólk við henni.

Ferjan sakk á 15 favna dýpi, og mánadagin góvust bjargingarliðini at leita eftir teimum, sum við vóru.

Starvsfólk stjala illa

Í Danmark verður javnan tosað um, at fólk stjala vørur í handlum, men nú vísir ein kanning, at í veruleikanum stjala starvsfólkini í handlunum meiri enn viðskiftafólkini.

Felagið hjá donsku handlunum vil vera við, at vørur fyri einar seks milliardir krónur hvørva úr handlunum á hvørjum ári. Sagt verður, at tey, sum lata handlunum vørurnar, snýta ella stjala fyri 1,2 milliard krónur, viðskiftafólkini stjala fyri 2,3 milliardir, og starvsfólkini í handlunum taka sær vørur til hús fyri einar 2,5 milliardir krónur um árið.

Amerikanskar kanningar hava fyrr víst, at har stjala starvsfólkini í handlunum umleið ein triðing av tí, sum hvørvur úr handlunum. Sambært donsku kanningini stjala starvsfólkini í donsku handlunum meiri venn teirra amerikansku felagar.

Hitamet í Noregi

Árið í ár er tað heitasta í Noregi, síðani norðmenn í 1866 fóru at máta hitan. Sambært veðurstovuni hevur meðalhitin higartil í ár verið 2,2 stig oman fyri meðalhitan seinastu 136 árini.

Norsku veðurmenninir siga, at verður veturin ikki væl kaldari enn vanligt, fer hitin í Noregi helst at seta met í ár. Orsøkin er tað sera heita summarið, sum serliga kom teimum í Trøndelag og í Vesturlandinum til góðar. Men eisini í september var hitin væl oman fyri tað vanliga nógvastaðni í Noregi.

Men norðmenn fáa ikki bara gagn av tí góða veðrinum. Tað hevur regnað minni í ár enn vanligt, og tí er minni vatn í vatngoymslunum hjá orkuverkunum enn onnur ár, og tað fer at hava við sær, at norðmenn noyðast at rinda meiri fyri elorkuna teir næstu mánaðarnar.

Muslimar kannast

Tey, sum í framtíðini koma til USA við flogfari úr Iran, Irak, Libya, Sýrialandi ella Sudan, skulu kannast, so skjótt tey hava sett fótin á amerikanska jørð.

Amerikansku myndugleikarnir siga, at tað nýggja stigið hevur til endamáls at forða fyri, at yvirgangsmenn ótarnaðir skulu sleppa til USA. Tað hevur ofta víst seg, at yvirgangsmenninir mangan ferðast sum vanlig ferðafólk, uttan at nakar kann fáa illgruna um, at teir hava ætlanir um yvirgang.

Amerikanska avgerðin hevur møtt harðari mótstøðu frá arabarum, sum búgva í USA. Teir vilja vera við, at avgerðin leggur allar arabarar og allar muslimar undir at vera yvirgangsmenn. Myndugleikarnir í Malaysia eru heldur ikki fegnir um avgerðina. Har hevur forsætisráðharrin sagt, at USA roknar nú allar muslimar sum yvirgangsmenn.

UTTAN ÚR HEIMI

Gøran Persson verður sitandi

Rættiliga óvæntað slakaði svenski Umhvørvisflokkurin fyri trýsti frá sosialdemokratunum gjáranáttina og gekk við til at stuðla stjórnini hjá Gøran Persson

SVØRÍKI
Árni Joensen

Gøran Persson heldur fram sum svenskur stjórnarleiðari. Tað varð greitt gjáranáttina, tá Umhvørvisflokkurin rættiliga óvæntað slakaði og gekk við til at atkvøða ímóti misálitisuppskotinum, sum tann borgarligi Fólkaflokkurin legði fyri ríkisdagin mánadagin.

Upprunaliga kravdi Umhvørvisflokkurin at fáa ráðharrasess í stjórnini aftur fyri at stuðla hana, men fyrrakvøldið slepti flokkurin brádliga kravinum. Ístaðin fekk flokkurin tilsøgn um átta ella níggju ráðgevar á teimum ymsu ráðstovunum. Hetta var eitt krav frá flokkinum, sum vildi hava ávirkan á tey ymsu málini, áðrenn tey verða løgd fyri ríkisdagin.

Men tað var ikki tað einasta, sum Umhvørvisflokkurin fekk burturúr. Stjórnin hevur bundið seg til at steðga svenska toskafiskiskapinum í Eystrasalti frá ársskiftinum fyri at verja stovnin, hon skal eggja kommunum til at avmarka bilferðsluna, og harafturat skal stjórnin kanna, hvat kann gerast fyri at skerja útreiðslurnar til verjuna.

Talsmaðurin hjá Umhvørvisflokkinum, Peter Erikson, segði í gjár, at ávirkan floksins fer at síggjast aftur í politikkinum hjá stjórnini, sum verður meiri umhvørvisvinarligur.

USA vil hava eftirlitið útsett

ST-samráðingarleiðarin Hans Blix og irakski samráðingarleiðarin Amir Al Sadi greiða frá semjuni um at lata vápnaeftirlitsmenninar hjá ST sleppa aftur til Irak at leita eftir hópoyðingarvápnum.
Mynd: Reuters

Amerikanska stjórnin er ikki serliga hugtikin av, at Irak og ST eru vorðin samd um at taka vápnaeftirlitið uppaftur

IRAK-KREPPAN
Árni Joensen

Sambært ST-samráðingarmanninum Hans Blix og iraksku samráðingarmonnunum kunnu teir fyrstu vápnaeftirlitsmenninir fara til Irak um einar fjúrtan dagar, men hetta er USA ikki serliga fegið um.

Tvørturímóti var amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, skjótur at gera vart við, at eftirlitsmenninir eiga ikki at fara til Irak enn.

- Vit hava ta áskoðan, at teir eiga ikki at fara til Irak, so leingi tær gomlu ST-samtyktirnar og tann gomla eftirlitsskipanin eru galdandi. Tí eiga teir at bíða, til teir fáa nýggj boð í einari nýggjari samtykt í trygdarráðnum. Eg eri sannførdur um, at ST eigur at samtykkja nýggjar ásetingar og treytir, sum skulu hava við sær, at vit ikki koma aftur í somu støðu um eitt ár, segði amerikanski uttanríkisráðharrin.

USA og Bretland hava lagt eitt uppskot um eina nýggja samtykt fyri hinar føstu limirnar í trygdarráðnum, sum eru Kina, Russland og Frakland, men enn hevur eingin teirra viljað tikið undir við uppskotinum, tí tað setur Irak alt ov harðar treytir, halda tey.

Sambært tíðindastovuni Reuter fer amerikanska uppskotið at hava við sær, at kanningarnar hjá eftirlitsmonnunum skulu útsetast. Irak skal fyrst góðtaka treytirnar í samtyktini, og innan 30 dagar skal landið lata ST eitt fullkomið yvirlit yvir tær verkætlanir, sum viðvíkja kjarnorkuvápnum, biologiskum vápnum og kemiskum vápnum. Ikki fyrr enn ST hevur fingið hetta yvirlitið, kunnu vápnaeftirlitsmenninir fara til Irak. Skuldi tað hent, at Irak sýtir fyri at góðkenna treytirnar ella at taka ST yvirlitið yvir landsins vápnaverkætlanir, stendur tað øllum ST-limalondum frítt at fremja neyðug tiltøk fyri at endurreisa frið og trygd í økinum, stendur í amerikanska uppskotinum.

Irakska stjórnin hevur longu sagt, at hon góðtekur tær gomlu samtyktirnar hjá trygdarráðnum, men at hon fer ikki at góðtaka nýggjar og harðari treytir. Stjórnin hevur eisini gjørt greitt, at samráðingarnar í Wien um at taka vápnaeftirlitið uppaftur vóru grundaðar á, at tær gomlu samtyktirnar verða verandi í gildi.

Forsetaborgirnar

Ein trupulleiki, sum stendur eftir, eru tær átta forsetaborgirnar hjá Saddam Hussein. Amerikanarar hava kravt, at eftirlitsmenninir skulu sleppa í kanna borgirnar, men tí hevur irakska stjórnin víst aftur. Leiðarin á eftirlitsmonnunum, Hans Blix, segði aftan á samráðingarnar í Wien, at har høvdu teir als ikki tosað um borgirnar. Hans Blix vísti tó á, at í 1998 gjørdi ST-aðalskrivarin Kofi Annan eina avtalu við irakar um tær átta borgirnar, og at eftirlitið har verður skipað eftir teirri avtaluni.

Franska stjórnin sigur, at hon umhugsar at leggja eitt neyðsemjuuppskot fyri trygdarráðið. Jacques Chirac, forseti hevur sagt, at Frakland er ikki hugað fyri at taka undir við uppskotinum hjá amerikanarum og bretum. Í Moskva hevur Vladimir Putin, forseti sagt, at Russland fer ikki at geva USA standandi loyvi til at leypa á Irak, og kinesiska stjórnin hevur somu støðu.

Ávegis verja í Kirkjubø

Nevndin, sum landsstýrismaðurin við mentamálum í fjør setti at gera eina ætlan fyri verju og varðveiting av Kirkjubømúrinum, hevur latið landsstýrismanninum eina ávegis ætlan fyri, hvussu hetta kann gerast

MÚRVERJA
Edvard Joensen

Kirkjubø: Múrnevndin er samd um tað ávegis tilmæli, hon í gjár lat landsstýrismanninum við mentamálum um verju og varðvetiting av Kirkjubømúrinum. Anliss Bjarkhamar, landsstýrismaður, takkaði fyri tilmælið og lovaði at gera sítt til, at arbeiðið heldur fram.

Áðrenn hann handaði landsstýrismanninum tilmælið, greiddi Petur Zachariasen, formaður í Múrnevndini, frá tí, nevndin hevur gjørt og gjørt av.

Hann segði frá, at ætlanin er at leggja eina sonevnda veðurverju yvir múrin. Hetta er í grundini sama ætlan, sum løgd varð fram av Fornminnissavninum longu í 1997 við onkrum smávegis broytingum. Men ætlanin byggir kortini á eina tillaging av teirri verklýsingini, segði Petur Zachariassen.

Í fyrsta uppskotinum var ætlanin at binda veðurverjuna inn í múrin, meðan hendan seinna ístaðin fer at festa verjuna í fundamentið undir jørð. Fyrireikingarnar til tað eru longu byrjaðar, og grivið er út fyri nøkrum av festunum.

Veðurverjan skal setast upp til at byrgja fyri regni og vindi eins og øðrum, sum virkar við til at bróta múrin niður.

Í fyrsta umfari verður tó bert gjørd ein lutvís veðurverja, segði Petur Zachariassen. Sett verður ein fýra faks verja upp á suðursíðuni á múrinum. Hendan skal so standa komandi vetur, meðan fylgt verður við, hvørja ávirkan hon hevur á niðurbrótingina, ella um hon steðgar hesari.

Komandi vár verður so verja løgd um allan múrin, har bygt verður á tær eygleiðingar, sum fara at verða gjørdar í vetur.

Ein fyribils tíðarætlan er løgd fyri arbeiðinum við at turka og granska múrin, og heldur hon, veðru veðurverjan væntandi tikin niður aftur á sumri 2007.

Men tað er ikki bara regn, sum fer illa við múrinum. Eisini vindurin tekur sín part, og tí verða gjørdar vindmátingar í Kirkjubø fyri á tann hátt at finna fram til, hvussu verjast kann í móti teirri ávirkanini.

Nevndin mælir eisini til , at kunningaátøk verða sett í verk soleiðis at áhugin fyri múrinum sum fornminni verður styrktur. Tann kunningin kann gerast bæði við skelting á staðnum, eins og faldarar, sum greiða frá múrinum og øðrum fornminnum á staðnum, verða gjørdir, segði Petur Zachariassen.

Seks fólk manna Múrnevndina. Tey eru umframt formannin, Petur Zachariasen, Símun Arge, fornførðingur, sum er næstformaður, Kirstin Eliasen, savnsstjóri, Marita Weihe, arkitektur, Jóannes Patursson, kongsbóndi og Jákup Thorsteinsson ráðgevi, sum eisini er skrivari hjá nevndini.

Petur Zachariassen handar Anliss Bjarkhamar ávegis tilmælið um verju av Kirkjubømúrinum
Mynd: Jens Kristian Vang

Tann, sum áhugaður er, kann eisini hyggja á heimasíðuna www.skulin.fo/peturz/avegis.pdf og har síggja tað ávegis tilmælið, sum gjørt er.



Veðurverjan skal leggjast oman yvir múrin og festast undir jørð

Læknaloysi í Sandoy

Sandoyggin liggur í læknaloysi, og einki røkist fyri, at nakar lækni verður aftur í oynni fyrr enn í fyrsta lagi um eina viku ella so. Fólk mugu so bara klára seg sum best, siga sandoyingar

HEILSUMÁL
Edvard Joensen

Sandoyggin liggur í læknaloysi. Kommunulæknin er burturstaddur, og fólk fáa einki annað at vita, enn tað, sum stendur á einum lepa í vindeyganum hjá læknanum.

Tá sandoyingar koma til lækna, stendur ein pappírlepi fyri teimum klistraður á ein rút, sum sigur, at læknin er burturstaddur. Tað er so tað, og tí kunnu vit ikki liva við, sigur Gerhard Lognberg, løgtingsmaður fyri Sandoynna.

Hann er ógvuliga misnøgdur við støðuna og sigur, at fólk eru ótrygg. Tey vita sær einki annað enn at ringja til læknarnar í Havn, um eitthvørt er, og so bara vóna, at teir forbarma seg yvir tey, sigur løgtingsmaðurin.

Men tað er ikki tí, at tey hava fingið nakra ávísing til havnarlæknarnar. Tað er bara nakað, tey sjálv mugu finna útav.

Ein einsamallur lækni er í Sandoynni og Skúvoy, og tað er alt ov lítið, sigur Gerhard Lognberg. Nú hann hevur verið burturstaddur, hevur onkur avloysari verið soleiðis eina viku í senn ella so. Men nú er knappliga eingin, og so standa fólk á berum.

–Hendir eitthvørt, so sum ein bilvanlukka ella annað, sum krevur viðger á staðnum, kann ein rættilig ólukka standast av, heldur hann.

Fólk kenna seg bæði ótrygg og hjálparleys, og tað kann undir ongum umstøðum halda fram soleiðis, siga sandoyarfólk.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá Heilsumálaráðnum, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Gerhard Lognberg, løgtingsmaður, sigur, at læknaviðurskiftini í Sandoy og Skúvoy eru út av lagi og mugu greiðast beinanveg